# Besta summarmyndin funnin



Ársins summarmynd 2001 var henda myndin, sum Mai-Britt Debes úr Havn hevur tikið



Mai-Britt Debes fær her handað eina uttanlandsferð fyri at hava tikið bestu summarmyndina 2001 frá Magna Arge og Svannu Nørspang

**Vinnarin av kappingini um Ársins summarmynd varð kunngjørdur á samkomu leygardagin. Vinnarin gjørdist Mai-Britt Debes úr Havn, sum vann við einari vakrari summarmynd av dótturini**

MYNDAKAPPING
*Heri á Rógvi*
*Myndir: 3´arin*

Eftir at hava leitað bæði væl og leingi, so er Ársins summarmynd funnin. Kappingin, Ársins summarmynd, er úrslitið av einum samstarvi millum 3´aran, Atlantic og Sosialin. Fólk høvdu møguleikan til at lata myndir inn til kappingin. Einasta ásetingin fyri kappingina var, at myndirnar skuldu vera summarmyndir. Tað var so upp til fólk sjálvi at meta um, hvat kundi hóska seg sum summarmynd og somuleiðis hóskaði seg til kappingina. Endamálið við kappingini var, at fólk skuldu kunna fáa meira burturúr myndunum, sigur Svanna Nørspang, fyrireikari av kappingini. Freistin at lata myndir var sett til 13. oktober, og leygardagin varð so vinnarin og hinar næstu níggu myndirnar í røðini almannakunngjørdar.

Fitt av fólki lýddu á, tá vinnararnir frá 1. til 10. pláss vórðu kunngjørdir, og tað var heldur ikki heilt frítt, at summir av luttakarunum vóru spentir.




STÓRT JÓLABORÐHALD
Á HOTEL ØRAVÍK

Stórt kalt borð
við alskyns fløgvum
og køldum rættum.

Leygarkvøldini 1. & 8. desembur

Felagssangur verður
við borðhaldið!

MOONSHOT úr Vestmanna
spæla til dans frá kl. 23:00

Kostnaður: Borðhald & dansur kr. 225,-
Einans dansur kr. 100,-

Borðbílegging á tlf. 37 13 02








2. pláss fór til Solveig Davidsen í Bø



Ásvør Andersen fekk eitt triðja pláss fyri ómakin við hesari vøkru myndini

**Av tilvild**

Á samkomuni leygardagin kunngjørdi Magni Arge, stjóri fyri Atlantic Airways, hvørjir vinnararnir frá 10. til 1. pláss vóru. Vinnararnir gjørdust (frá 10. plássi): Esther Sørensen, Tórshavn, Jógvan Jacobsen, Kolbanargjógv, Jákup Apol, Tórshavn, Sonja Johannesen, Oyri, Ólafur Arnfriðson, Tórshavn, Palli Jacobsen, Vágur, Lív Danielsen, Strendur, Ásvør Andersen, Nes, Solveig Davidsen, Bøur, Mai-Britt Debes, Tórshavn.

Vinnarin, Mai-Britt Debes, hevði latið eina summarmynd av dóttur sínari inn til kappingini.

- Myndin var mestsum tikin av tilvild, segði Mai-Britt Debes eftir at hennara mynd var kosin ársins summarmynd. Mai-Britt fekk eina uttanlandsferð fyri ómakin, og hon tóktist fegin.

Svanna Nørspang, fyrireikari, segði í einari aðrari grein í sambandi við myndakappingina, at tað kanska vóru ov nógvar myndir av børnum og ov lítið av náttúru. Tískil var tað kanska passandi, at vinnaramyndin gjørdist ein sameining av bæði børnum og náttúru.

Fitt av fólki var í SMS leygardagin, tá vinnararnir av kappingini vórðu avdúkaðir




## Bólkaleiðari fyri support av interneti

"Stóra leiðaranum tørvar ikki at ganga á odda – honum er tað nóg mikið at vísa kósina"
Henry Miller

Á Marknaðardeildini (internetsupport) søkja vit eftir fólki til at hava ábyrgdina av, at vit veita eksternu og internu kundum okkara bestu supporttænastuna í internetbrúki. Hetta er nýtt starv, og bólkaleiðarin kemur í stóran mun at vera við til at betra og broyta kundarøktina.

**Arbeiði á internetsupport snýr seg m.a. um, at**
- Vegleiða kundar um uppsetan av internetforritum
- Vegleiða kundar um brúk av internettænastum, herundir eisini WAP
- Skráseta feilir, viðgera teir ella senda teir til avvarðandi ábyrgdarhavandi
- Stovna hjálp
- Vegleiða starvsfelagar

**Førleikar, sum eru neyðugir, eru**
- Viðkomandi útbúgving
- Kunnleiki til internettænastur
- Kunnleiki til uppsetan av internetforritum
- Grundleggjandi kunnleiki til strukturin í internetinum
- Førleiki at undirvísa og at leggja undirvísing til rættis
- At fara væl um kundar
- Góður teldukunnleiki

Tann, ið settur/ur verður, skal kunna sýna ábyrgd yvir fyri sær sjálvum og teimum, sum starvast undir.

Viðkomandi skal vera útatvend/ur og hava hug at hjálpa og vegleiða kundar og starvsfelagar.

Innihaldið í arbeiðnum er at vera bólkaleiðari fyri support av internettænastum okkara,herundir at veita kundatænastu, skipa soleiðis fyri, at kundatænastan virkar og at dagføra starvsfólkið við vitan. Í løtuni arbeiða 3 fólk við internetsupport. Tey arbeiða í tøttum samstarvi við uml. 5 onnur við dagliga rakstrinum av internetinum.

Arbeiðt verður út frá Føroya Tele í Tórshavn.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og avvarðandi yrkisfelag.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Richard Mortensen, Marknaðarleiðara tel. 303030.

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum og ummælum, skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi hósdagin 1. november 2001 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýrið eigur 100%. Sum Føroya størsta fjarskiftisfyritøka hevur Føroya Tele ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Nettosølan var í 2000 kr. 292 mió. Á Føroya Tele arbeiða 250 fólk í 30 deildum á 14 ýmiskum støðum kringa alt landið.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!


